## Færri hús seld

**Søla**: "Í Danmark er rentustøðið sera lágt. Fríviðini á húsum økjast og fólk hava eina trúgv uppá, at hetta verður gongdin í nógv ár framyvir. Ein tosar um e0itt satt boom innan bygging og renovering".

Soleiðis verður sagt av fólki innan byggivinnuna. Men samstundis eru aðrar røddir frammi sum siga, at "boligfesten er slut nu".

Í danska blaðnum BT var í farnu viku nortið við hesi viðurskifti. Her verður sligið fast, at tær ógvusligu príshækkingarnar á bústøðum eru lidnar. Rentulopið fær nú eisini keypararnar av bústøðum at steðga á. Hetta merkja eisini donsku húsameklararnir.

– Áður var tað so, at í tíðin, sum húsini vóru til sølu, er longd við 10 til 15 %. Hetta er fyri okkum eitt greitt tekin um, at steðgur er við at koma í, sigur Jesper Elle, kunningartalsmaðyr hjá Nybolig.

Hjá størsta meklaravirkinum í Danmark, Home, vænta tey einans ein prísvøkstur uppá 5 til 10 % í ár.

## Baltar hjá dønum

**Arbeiðsmegi:** Nógvar danskar fyritøkur hava trupulleikar at útvega nóg stóra arbeiðsmegi til eftirspurning teirra.

Nú hevur Baltic WorkForce latið upp eina skrivstovu við tí endamáli at útvega hesa til danska byggiídnaðin.

Henda danska fyritøkan hevur seinastu árini útvegað ein hóp av útlendskari arbeiðsmegi til donsk gartnarí'ir, landbúnaðin og donsku skógirnar.

Fyritøkan, sum danir eiga part í, fer nú at finna fram til arbeiðsmegi til byggiídnaðin, sum í løtuni hevur trupulleikar at útvega nóg mikið av arbeiðsmegi. Alt verður gjørt eftir donskum lønar- og arbeiðstreytum.

Fyritøkan merkir stóran eftirspurning eftir arbeiðsfólki serliga úr Litauen. Teir hava drúgvar royndir í at útvega uppihalds- og arbeiðsloyvi, og tí lættir tað nógv um hjá teimum ymisku byggifyritøkunum at kunna venda sær til eitt einstakt stað at ordna hetta.

# Hent tól fyri ein bíligan pening

**Nútíðar tøknin hevur eisini gjørt sína ávirkan galdandi innan byggivinnuna. Tey nýggjastu tólini gera tað bæði lættari og skjótari hjá handverkarunum at arbeiða**

BYGGERI 2006
*Orð/mynd: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*




*Kjartan Hansen (vinstrumegin) og Dennis Hansen hyggja eftir einum kendu tóli – einum nivelleringstóli. Prísurin er lækkaður sera nógv tey seinnu árini*

**Nivellering:** Eitt av byggifeløgunum sum vóru umboðað í føroyska hópinum á Byggeri 2006 var Kanjon.

Saman við systkinabarni sínum, Dennis Hansen var Kjartan Hansen við fyri hesa fyritøkuna.

Fyri teir var nógv áhugavert at fáa eygu á – bæði av tí nýggja, men eisini av tí meiri vanliga og kenda innan amboð og tilfar.

Eitt av hesum amboðum, sum teir nýta í sínum arbeiði er eitt nivelleringstól. Og á messuni vóru fleiri slík víst fram í ymiskum støddum og prísflokkum.

– Hetta er eitt tól sum vit brúka rættiliga nógv, siga teir báðir.

### Gott og gamalt

Á slíkari byggimessu sum hesari finst alt tað nýggjasta bæði innan tilfar og amboð. Men eisini okkurt við eldri dagfesting, sum ein ikki noyðist at skifta út soleiðis í bræði.

Millum tólini, sum vóru at síggja á stóru messuni, var eitt lasarastýrt tól, sum fólk innan byggivinnuna nýta at nivellera við – tað er: at rætta av við, javna ella slætta.

Fyrimunurin við hesum tólum er, at tey kunnu bæði brúkast í smærri rúmum og tá talan er um størri økir.

Við einum slíkum nivelleringstóli ber nevniliga til at rætta gólvini av við. Og ein kann eisini brúka tólið, tá ein skal máta ella seta hæddir av í sambandi við útstykkingar.

– Jú, hetta er eitt ógvuliga hent tól, eru Kjartan og Dennis samdir um.

### Skjótt og effektivt

Eins og við flest øllum tólum í dag, so eru tey gjørd fyri at spara bæði tíð og pening.

Eitt nivellerings-tól av slíkum slagi er einki undantak í so máta. Høvuðsorsøkin til hetta er, at tað lættir so nógv um hjá handverkarunum.

– Hetta er munandi skjótari og betri at brúka. Fyrr var ofta neyðugt við tveimum monnum til nivelleringina, men nú kann ein einstakur maður gera tað sama.

– So hetta er eitt sera effektivt apparat, siga teir báðir.

### Bíligari

Hóast nógv nýtt var at síggja á byggimessuni, so hava hesi nivellerings-tólini kortini fleiri ár á baki.

Tað var tí – sum so – ikki nakað slóðbrótandi nýtt at heinta hjá Kjartani og Dennisi í júst hesum førinum. Og tó:

Er tað nakað sum er broytt hesi seinastu árini, er tað kostnaðurin fyri eitt slíkt tól.

Fyri nøkrum heilt fáum árum síðani kundi ein keypa eitt slíkt tól fyri langt oman fyri 20.000 kr.!

Í dag kann ein vanliga keypa eitt slíkt tól í Danmark fyri ein bruttopris uppá slakar 6.000 kr.

Men á Byggeri 2006 fingu kundarnir eitt slíkt tól til keyps fyri serprís – 3.995 kr.

– So her er ein øgiligur munur á, siga teir báðir við ein munn.

# Mest finessir

**Kári Simonsen frá KS Timburhús hevur úr at gera í løtuni. Hann tók kortini av tilboðnum at koma við á byggimessuna í Fredericia**

BYGGERI 2006
*Snorri Brend*



*Kári Simonsen (fremst vm.) hevur nógv hús í gerð í løtuni. Í gjár byrjaðu teir uppá eitt í Miðvági*

**Sethús:** Ein sum merkir til økta tørvin á handverkarum í Føroyum er Kári Simonsen.

Hann hevur gjøgnum árini smíðað eina rúgvu av sethúsum, og í løtuni eru teir eisini í ferð við fleiri sethús.

Fyrrapartin í gjár byrjaðu teir uppá eini nýggj sethús í Miðvági, men annars eru teir flestu av hansara monnum til arbeiðis í Hoyvíkshaganum.

Teir hava eisini eini sethús á Norðskála, sum teir skulu smíða einaferð seinni.

– Ja, faktiskt hava vit arbeiði heilt fram til 2008, sigur ein bjartskygdur Kári.

Kári var eisini millum teir 84 føroyingarnar sum løgdu leiðina inn á stóru byggimessuna í farnu viku.

Hansara áhugi var at hyggja eftir teimum nýggju maskinunum, og har var eisini mangt ymiskt at síggja.

– Her var kortini ikki nakað kollveltandi nýtt hesaferð, men har vóru tó nakrar finessir sum høvdu mín áhuga, sigur Kári. Í sama viðfangi hugdi hann eisini eftir ymiskum útgávum av tøkum og takrennum.

Kári er ein av mongum kundum hjá Timburhandlinum, men keypir annars har sum hann fær besta prísin.